


*Laila Solmunde, forkvinna í MBF, fegnast um, at felagið nú er beinleiðis nevnt í lógini um veddingarpengarnar*

# Hálv millión til MBF

## Tillagingar í lógunum hjá Ítróttavedding hava verið fyri í Tinginum, og eftir broytingaruppskoti frá Jákup Mikkelsen fara nú 5% veddingarpengunum, sum koma aftur til Føroya, beinleiðis til MBF

Leo Poulsen

Dagføring av lógunum um ítróttavedding hevur verið fyri á Tingi.

P/F Ítróttavedding kann bert gera avtalur fyri fimm ár í senn, og tað er í sambandi við endurnýggjan av avtaluni við Danske Spil, at uppskot um ítróttavedding hevur verið fyri í Tinginum.

P/F Ítróttavedding hevur eftirhondini nøkur ár á baki, og varð sett á stovn tá Tipstjenesten, sum nú hevur broytt navn til Danske Spil, eftir samráðingum eisini fór at útgjalda part av yvirskotinum til Føroya í sambandi við, at loyvi varð givið føroyingum at spæla við í dnskum eydnuspølum.

P/F Ítróttavedding varð sett á stovn við trimum eigarum. ÍSF eigur 50%, Føroya Ungdómsráð 30% og Landsstýrið 20% av felagnum.

Av útgoldna avlopinum hjá Danske Spil til Føroya fær ÍSF 60% til ítróttaendamál, FUR (Føroya Ungdómsráð) 20% og síðani ræður Mentamálaráðið yvir seinastu 20%.

Ein lítil broyting varð skotin upp í uppskotinum, sum nú er samtykt við triðju viðgerð, og tað var hon, at 5% av teimum 20%, sum Mentamálaráðið fær at ráða yvir, skulu markast til Happadráttargrunnin, sum annars er tømdur fyri innihald, nú eingin happadráttur er longur.

Hetta metti Jákup Mikkelsen tó geva lítla meining.

- Eg metti, at eingin grund var at seta Happadráttargrunnin inn sum eitt millumlið millum Mentamálaráðið og MBF. Í uppskotinum stóð, at 5% skuldu latast Happadráttargrunninum at býta út til tiltøk til frama fyri brekað. Tí kom eg við einum broytingaruppskoti til aðru viðgerð um, at peningurin í staðin skuldi fara beinleiðis til Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum, sigur Jákup Mikkelsen.

### Lógartryggjaðir pengar

Hesum broytingaruppskoti tók Løgtingið undir við og samtykti tað við aðru og triðju viðgerð.



*Til aðru viðgerð legði Jákup Mikkelsen fram broytingaruppskot um, at 5% av partinum hjá Mentamálaráðnum skuldi fara beinleiðis til MBF í staðin fyri umvegis Happadráttargrunnin*

Hetta merkir, at MBF fær ein beinleiðis stuðul um árið upp á millum 400.000 og 500.000 krónur.

Tað er ójavnt, sum føroyingar spæla við í donsku eydnuspølunum, men royndirnar hava víst, at bornar verða millum átta og tíggju milliónir aftur til Føroya um árið, og nú er so samtykt, at MBF fær 5% av pengunum, sigur Jákup Mikkelsen.

Hetta merkir, at býtið frameftir verður 60% til ÍSF, 20% til FUR, 15% til Mentamálaráðið og 5% til MBF.

Hetta merkir so aftur, at MBF við lóg er tryggjað 5% av teirri afturbering, sum P/F ítróttavedding fær frá Danske Spil, og tað liggur millum 400.000 og hálva millión um árið.

Umframt hesar pengarnar til MBF, fær ÍSB sum partur av ÍSF eisini sín part av veddingarpengunum, og hóast talan sum so er um tveir púra ymiskar felagsskapir, so er nú lógartryggjaður teimum brekaðu í Føroyum ein fittur partur av veddingarkøkuni.

# MBF fegnast um veddingarpengar

## Laila Solmunde, forkvinna í MBF, heldur, at peningainnspræningin frá veddingarpengunum fer at geva teirra limafeløgum ein fantastiskan møguleika at blomstra

Leo Poulsen

Broytingin í býtinum av veddingarpengunum, sum Løgtingið samtykti við triðju viðgerð í vikuni, merkir, at Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum nú verða beinleiðis nevnt sum móttakari av 5% av afturberinginí.

– Vit kunnu bert fegnast um, at vit nú eru við í veddingarpengunum, sigur Laila Solmunde, forkvinna í MBF.

Longu undan at P/F ítróttavedding varð sett á stovn, kundi MBF umvegis Ríkisumboðið søkja um at fáa pengar frá tí, ið tá æt, Tipstjenesten, men seinni lutaði Happadráttargrunnurin út pening frá sínum spæli.

– Happadráttargrunnurin lutaði pening út til øll tiltøk, sum høvdu við brekað at gera, og ikki bert til okkara limafeløg. Tíverri bara minkaði og minkaði grunnurin, til hann at enda var tómur, sigur Laila Solmunde.

Tí er hon stak væl nøgd við, at møguleiki nú aftur verður fyri at limafeløgini hjá MBF fáa møguleika fyri fíggjarligum stuðli.

– Um tað verður gjørt umvegis Happadráttargrunnin ella tað er MBF beinleiðis, hevur ikki so ógvuliga nógv at siga. Tað er sjálvandi lættari, um MBF umsitur pengarnar, soleiðis sum tað nú er samtykt, tí tað gevur okum møguleika, at hugsa um tey 24 feløgini, sum eru limir í MBF, sigur Laila Solmunde.

Enn er hetta so nýtt, at tey ikki heilt hava gjørt av, hvussu tey skulu umsita pengarnar.

– Hetta gevur í hvussu er okkara limafeløgum møguleikan veruliga at blomstra og taka tøk til tess at bøta um korini og umstøðurnar hjá brekaðum í Føroyum, sigur Laila Solmunde.